# Danir vilja neyvan bróta niður tað teir hava vunnið síðan 1969!?

**HERI SIMONSEN**



1969 var eitt merkisár fyri bæði Danmark og Ísland. Tá fingu londini aftur beint viðurskiftini sína millum á eina kós, sum sømir seg tveimum norðurlendskum brøðratjóðum. Okkara norðurlendsku brøður, íslendingar og danir sótu ikki so grúiliga væl um sátt árini eftir seinna heimskríggj.

Danir vóru firtnir um, at Ísland hevði loyst frá teimum í 1944 meðan teir sjálvir vóru hertiknir av Týsklandi. "Aftursvarið" hjá dønum var at nokta at útflýggja íslendingum teirra tjóðargrip, ið tá var í varðveitslu á danska tjóðarsavninum, nevnliga upprunaligu handritini til íslendsku saga'irnar. Á látini nevnt "Arnemagneiska" savnið eftir Árna Magnusson, ið bjargaði handritunum undan glatan. Og rós skal danska tjóðarsavnið hava, at teir sendu ein mann til Íslands at bjarga handritunum. Men í 1945 høvdu íslendingar fingið umstøðar til at kunna hava tjóðargripin í egnari varðveitslu.

Nýstovnaða íslendska lýðveldið kravdi, sum rímuligt varð, at danska stjórnin útflýggjaðu teimum hendan tjóðargripin í stundini.

Men nei. Skiftandi danskir forsætismálaráðharrar og mentamálaráðharrar lógu á málinum, og ikki fyrr enn fjórðingsøld var farin brast fyri nev. Og í 1969 stevndi eitt danskt verjuskip inn á Reykjavík við tjóðargripi Íslands. Tá var veitsludagur kring alt Ísland. Tí "søguliga sálin" var heimafturkomin! Alt síðani 1969 hevur bara gingið framá hjá Danmark og Íslandi. Nógvur samhandil er landanna millum.

Íslendingar eiga kendar danskar fyritøkur, og nú lesur eitt túsindtal av íslendingum í Danmark, og eitt stórt tal av donskum ferðafólki vitjar Ísland á hvørjum ári. Tí trúgvi eg ikki, at danir ynskja at gera nakað yvirhøvir, sum kann føra aftur til tey viðurskiftini, sum vóru landanna millum árini eftir seinna heimskríggj.

Og tí trúgvi eg heldur ikki, at danir fara at nokta at lítlabeiggja íslendinga, Føroyum, at flagga við Merkinum uttan fyri umboðsstovu Føroya í Reykjavík. Danir fara neyvan at bróta tað niður, teir hava vunnið síðstu 38 árini!

# Flytið almennar stovnar úr býnum

**HEÐIN DÁNIALSSON POULSEN**



Milliónir verða árliga brúktar til leiguútreiðslur til almennar stovnar, soleiðis at hesir kunnu húsast í Havnina og mangan í ótíðarhóskandi hølum fyri høga leigu. Tíðin er komin at flyta almennar tænastustovnar úr býnum, men at spjaða teir um alt landið, kann gerast ein dýrt ævintýr og hava við sær eina ómetaliga dýra og vánaligari umsiting. Eg havi áður víst á, at um miðfyrisitingin ikki verður meira samlað soleiðis at hon fer at arbeiða sum ein eind, so fer miðfyrisitingin aldrin at gerast so mikið professionell, sum hon burdi verið fyri at kunna kappast um arbeiðspláss og ikki minst, fyri at kunna menna tær lógir og almennu skipanir sum skulu til fyri at reka eitt vælferðarsamfelag. Verða teir almennu stovnanar spjaddir um landið, verður samstarvið minni, menningin minni og dubultfunktiónir verða mangar, sum í longdini fara at økja um almennu útreiðslurnar munandi. Økini og bygdirnar í Føroyum verða ikki bjargaðar bert tí nøkur almenn sitipláss verða flutt, tað krevst ein veruligur politiskur vilji, men meira um tað eina aðru ferð.

### Samgonguskjal

Skriva stendur í samgonguskjalinum at: "Almenna fyrisitingin verður samskipað, so betri samstarv fæst millum aðalráðini. Fyrisitingin skal gerast meira opin og einføld fyri brúkaran. Rættartrygdin skal styrkjast." Tað hevði verið áhugavert at fingið upplýst frá løgmanni, hvat hann hevur gjørt við hesa avtaluna sum staðfest í samgonguskjalinum, ella um orðini hjá Nixon eru best hóskandi svar: "Any change is resisted because bureaucrats have a vested interest in the chaos in which they exist".

Alt á einum stað Framtíðin liggur í, at landsstýrið letur byggja eina miðstøð til almenna umsiting uttan fyri býin, men tætt at Havnini. Kaldbaksbotnur hevði verið eitt hugskot, eitt vakurt og lætt atkomuligt økið við ríkiligt av bíligari almennari jørð. Ein næstan endaleysur listi av fyrimunum er lættur at gera, eitt nú slepst undan teimum dýru leigusáttmálunum í býnum, almennu yrkisbólkarnir verða samlaðir á einum stað og fáa ágóðan hvør av øðrum, alt KT virksemi og KT-trygd kann samskipast, tað verður bíligari, betri og praktiskari. Fyri vinnulívið fer tað eisini at fáa eina positivu avleiðing, tað verður betri pláss og bíligari hjá vinnulívinum at fáa innivist í hølum í býnum. Fyri borgarin fer tað at merkja, at hann kann fara á eina adressu at fáa øll síni viðurskiftir við tað almenna avgreidd. Heldur enn at kanna hvussu vit pilka almennar stovnar sundur, skal løgmaður kannað hvussu miðfyrisitingin og tilhoyrandi stovnar hóskandi kunnu samlast á einum stað, so vit kunnu menna teir, fáa bíligari rakstur og gera tað einfaldari fyri borgaran, júst sum staðfest í samgonguskjalinum.

Tryggingarfelagið Føroyar:

# Út á skúlar at leita eftir næmingum

**VINNULÍV**

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Javnan tekur Tryggingarfelagið Føroyar inn nýggjar næmingar, sum har kunnu fáa eina góða útbúgving. Nú fer tryggingarfelagið at kunna miðnámsnæmingar um teir mongu framtíðar møguleikar, eitt starv í Tryggingarfelagnum Føroyar gevur.

Umleið 120 fólk arbeiða hjá Tryggingarfelagum Føroyar, og tey leggja stjóran dent á at seta nýtt fólk við. Felagið gongur nú nýggjar leiðir til tess at eggja virkisfúsum ungfólki til at søkja lærupláss hjá tryggingini.

Í næstun verða kunnandi fundir fyri miðnámsskúlanæmingar kring landið, so teir kunnu fáa alt at vita um teir mongu framtíðar møguleikar, eitt starv í Tryggingarfelagnum Føroyar kann geva. Eitt lærupláss hjá Tryggingarfelagnum Føroyar fevnir um eina tvey ára útbúgving, ið gevur góðar møguleikar fyri persónligari menning og víðari starvsmøguleikum í framtíðini.

– Endamálið við tiltakinum er at geva miðnámsskúlanæmingum eitt høvi at fáa alt at vita um teir møguleikar og tær avbjóðingar, sum fylgja við tí at vera næmingur í Tryggingarfelagnum Føroyar, sigur Jónsvein Simonsen, deildarstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

– Tá vit søkja eftir næmingum, fáa vit altíð nógvar umsóknir, men fyri tað vilja vit fegin hava enn fleiri at søkja og vísa áhuga fyri okkara útbúgvingarmøguleika. Tað er ikki allir miðnámsskúlanæmingar, ið vita, hvat teir ætla eftir lokið miðnámsskúlaprógv, men við hesum vilja vit í øllum førum geva teimum ein góðan valmøguleika.

Kunningartiltakið vendir sær til síðstaársnæmingar á studentaskúlunum, HF-skeiðunum og handilsskúlunum, og tiltakið verður bæði í Havn, á Kambsdali og í Vági. Í hesum sambandi hevur Tryggingarfelagnum Føroyar havt plakatir og annað kunnandi tilfar frammi á skúlunum, fyri at vekja áhugan hjá miðnámsskúlanæmingum.

Tiltakið verður skipað á tann hátt, at fólk koma at greiða frá og svara spurningum. Helena Dam á Neystabø, dagligur leiðari á Føroya Skúlabókagrunni, fer at greiða alment frá, hvønn týdning tað hevur at útbúgva seg. Síðani greiðir Henning Mikkelsen frá Finanssektorens Uddannelsescenter í Danmark frá tí teoretiska í sambandi við eina tryggingarútbúgving.

Síðani verður eisini ein steðgur, har Tryggingarfelagið Føroyar bjóðar pizza og sodavatn, og eftir steðgin fara so fólk, ið hava verið næmingar og fingið sína útbúgving í Tryggingarfelagnum Føroyum, at greiða frá tí praktiska viðvíkjandi útbúgvingini.

# Bíblian og ymiskar tulkingar

**NICOLINA JENSEN BEDER**



Við stórum áhuga havi eg lisið tað, ið Hans Andrias Sølvará hevur skrivað, eins og eg havi lisið tað, ið Richard Danielsen hevur skrivað. Tó haldi eg ikki, at Richard Danielsen og eg hava lisið við somu brillum, tá ið hann í aftursvari sínum skrivar til Hans Andrias Sølvará:

»Eg eri tí als ikki samdur við tykkum um, at Markus og Jóhannes mótsiga hvør øðrum.

Tá vit so koma til tað næsta í greinini, har tú mestsum noyðir bæði meg og onnur til at boyggja okkum fyri tí, sum tú metir er skilvísi, tí tað, sum Jóhannes sigur vera seinastu orð Jesusar, og tað, sum Lukas sigur vera seinastu orð hansara, kunnu ikki bæði vera tað rætta, so er svarið nei, nei. Einki boyggi eg meg fyri einum slíkum pástandi. Hetta er yvirhøvur einki problem fyri meg. Annar sigur frá tí, sum fyri okkum at síggja hevur fest seg í minni hansara, og hin skrivar um tað, sum hevur fest seg í minni hansara. Eg síggi ikki hetta, sum at teir trætast um, hvat nú var akkurát tað seinasta orðið.«

Nú siti eg sum Kánus. Fyri tað fyrsta havi eg á ongan hátt kent meg noydda at boygt meg fyri nøkrum av tí, ið Hans Andrias Sølvará hevur greitt frá úr ymiskum søguligum keldum. Men tá ið Richard Danielsen í sínum mótmæli greiðir frá, at Hans Andrias hóast alt hevur rætt, siti eg sum eitt spurnartekin.

Victor á Lakjuni hevur eina sera áhugaverda grein í Dimmalætting, »Bíblian og fornfrøðin«, ið hann hevur umsett úr enskum. Eg fari at taka okkurt smávegis úr hesi grein fyri at vísa á, hvussu lætt tað er at mistulka ymisk orð. Marius Johannesen, fyrrverandi háskúlastjóri, segði einaferð í eini røðu: »Minnist til tað skrivaða orðið, tí tað verður standandi.« So satt, sum tað er sagt.

Eitt brot úr greinini:

»Grundað á enn fýra ár av útgrevstri kundi Zertal til endans fullfíggja myndina av bygninginum.

Úrslitið av lýsingini var, at hetta var so sláandi meinlíkt tí, sum Bíblian so nágreiniliga sigur, hvussu eitt altar skal vera.

Júst soleiðis, sum Gud hevði fyriskipað, vóru eingi trin á steinskráanum: »Men gert tú Mær altar av gróti, so skalt tú ikki gera tað av høgdum steini; tí táið tú setur meitil á steinin, vanhalgar tú hann. Tú mást ikki ganga á trappum upp at altari Mínum, fyri at ikki blygd tín skal verða ber yvir tí.« (2. Mós. 20:25-26). Hetta var eitt fyrivarni, soleiðis at prestsins klæði ikki skuldu opinbera beinini, tá ið hann steig upp á altarið.«

Eg helt meg vera rættiliga vísa í, hvat orðið blygd merkir. Her endurgevi eg tað, ið eg fyri stuttum havi skrivað um »Reglur um prestabúnan« (2. Mós. 28,42-44): »Og til tess at fjala blygd teirra skalt tú gera teimum undirbrøkur av líni, sum skulu røkka frá mjødnunum niður á lørini. Í teimum skulu Áron og synir hansara vera, tá ið teir ganga inn í samfundartjaldið, og tá ið teir nærkast altarinum til gudstænastu í halgidóminum, til tess at teir ikki skulu gera seg sekar og týna lív. Hetta skal vera Ároni og eftirkomarum hansara ævigt løgmál.«

Tá ið eg nú las, at prestsins klæði ikki skuldi opinbera beinini, helt eg, at hetta ljóðaði somikið merkiligt, at eg mátti fara at hyggja eftir í »Føroyskari Orðabók«. Har gjørdist eg ikki stórvegis klókari (blygd -ar kv2e (bíbl.) skøp (serst. á kvinnu). Her má okkurt vera komið skeivt fyri. Í Bíbliuni verður tosað um Áron og synir hansara, sostatt má blygd vera eitt felagsheiti. Í Føroyum hevur ikki verið vanligt at tosa um slíkt. Øll kenna vit ymisk heiti, tað veri seg hjá manni ella kvinnu, men eitt gamalt felagsheiti, ið eisini hevur verið vanligt, er »hitt allarheilagasta«. Hetta heitið hevði møguliga verið hóskandi í hesum føri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar. Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.